# FM vinnarar hjá Neistanum

*Tíðindaskriv frá Neistanum*

Kappingarárið 1999-2000 royndist sera væl hjá Neistanum. Felagið hevur um 430 virknar limir og um 30 lið tóku lut í kappingini í vetur. Sigast má at hjá teimum flestu liðunum hjá Neistanum gekk sera væl. Av 12 møguligum FM-heitum vann Neistin gull í teimum 7. Harumframt vunnu 2 lið silvur og 2 bronsu.

Í yngri deildunum verður eisini kappast um at vinna B-kappingarnar og her vann Neistin gull í 4 av 6 møguligum. Harafturat vunnu 2 lið silvur og trý lið bronsu. Í steypakappingunum vann Neistin 4 gullmerki av 10 møguligum og harumframt 5 silvurmerki.

Hóast hondbóltskappingar ikki eru í løtuni liggur felagið ikki stilt, tí í summar verður farið við omanfyri 100 yngri leikarum til Partillecup í Svøríki. Og til slíka ferð er neyðugt at venja og tað verður gjørt hvønn gerandisdag í vikuni.

Annars verður summarhálvan nýtt til at brynja seg út til komandi kappingarár - og til tað hevur Neistin melda 34 lið!

**Nýggj nevnd**
Hóskvøldið 18. mai varð ársaðalfundur Neistans hildin, og m.a. var val av nevnd á skránni. Eftir fundin skipaði nevndin seg við Jón Kragesteen sum formanni, Vár í Ólavsstovu, sum skrivara og harafturat er Rói Egholm eisini í nevndini. Tiltakslimir eru Páll Nólsoy og Balli Mohr.

# Breyt hondina

*Fram til summarsteðgin noyðist B36 at klára seg uttan stuðul frá Carl Herup Høgnesen*

Jákup Mørk

Tá fjórðingsfinalan í steypakappingini millum havnarfeløgini bæði varð blást av, vóru helst ikki mong, sum grunaðu, at hetta var seinasta ferðin í nakrar mánaðir, at tey sóu vongverjan hjá B36, Carl H. Høgnsen, á vøllinum.

Allar 120 minuttirnar stríddist hann saman við liðfeløgunum, men beint eftir dystin varð hann fluttur út á skaðastovuna.

Orsøkin til hetta var, at hann hevði ógvusliga pinu í báðum hondliðunum, eftir at ikki fekk tikið rætttuliga fyri seg í einum falli.

Sjálvur greiður Carl frá, at hann datt eftir ein nærdyst, og at hann ikki fekk tikið rættuliga fyri seg við hondunum.

**Minst 8 vikur**
Á skaðastovuni varð skjótt staðfest, at talan var um brot á aðrari hondini, og varð henda alt fyri eitt løgd í gips.

Carl sigur, at tað enn ikki er endaliga staðfest, hvussu støðan er við hinari hondini. Fyri fyrst er hon bundin inn, men í komandi viku skulu nýggjar røntgenmyndir takast, og tá fæst endalig vissa fyri, hvussu støðan er.

Undir øllum umstøðum verða komandi mánaðirnir fótbóltsfríir hjá Carl, tí boðini frá læknanum eru í minsta lagi átta vikur í gips. Tað vil siga, at fram til miðjan juli mánað fær hann í øllum førum ikki hjálpt B36, og møguliga merkir hetta eisini, at hann ikki er førur fyri at vera við, tá B36 í august mánaði skal royna seg í UEFA-cup kappingini.


*Carl Herup Høgnesen noyðist nú at binda frið komandi átta vikurnar*


*Gentur 10 b: FM gull, steypakappingin gull*


*Kvinnuunglingar: FM gull*


*Gentur 12 a: FM gull, steypakappingin gull*


*Dreingir 12 a: FM gull, steypakapping silvur*


*Gentur 14 b: FM b gull*


*Dreingir 12 c: FM b Gull*


*Gentur 14 a: FM gull, steypakapping gull*


*Dreingir 16 a: FM gull, steypakapping silvur*


*Gentur 16 b: FM b gull, steypakapping silvur*


*1. Deild Menn: FM gull, steypakapping silvur*




## Leiðari

Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir leiðara at byrja aftaná summarfrítíðina ella eftir avtalu.

Vit bjóða eitt áhugavert starv á einum stovni við sera góðum plássi innandura og eru góðir møguleikar fyri at royna nýggjar hugsanir. Starvsfólkini hava starvast her leingi og gleða seg og eru positiv fyri nýggjum íblástri.

Stovnurin er normeraður til 60 børn í 3 til 7 ára aldri. Vit hava pedagogar í øllum pedagogstørvum. Tveir av pedagogunum eru settir í starv í ár. Tað er ikki ein treyt at duga rokniskap. Møguleiki er at seta fólk til hetta arbeiði.

Leiðarin skal hava pedagogiska útbúgving. Um ongin við pedagogiskari útbúgving søkir kann leiðari við aðrari relevantari útbúgving verða settur í starv fyribils. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við viðmælum og møguligum prógvum skulu sendast nevndini innan 20. juni 2000.

**Nevndin fyri**
**Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð**
Jónas Patursonargøta 13
100 Tórshavn

## Blákrossheimið søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir fólki við hóskandi útbúgving til Blákrossheimið at byrja 1. august 2000.

**Hóskandi útbúgving:**
Sosialráðgevi
Lærari
Sjúkrasystir
Diakon
Pedagogur

Tað er eisini ein fyrimunur, hevur tú eina terapeutiska útbúgving og royndir innan rúsdrekkaviðgerð.

Starvið umfatar í høvuðsheitum viðgerð av rúsevnismisnýtarum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt til starvið. Roknast kann við kvøld- og vikuskiftisvaktum.

Ein treyt er, at viðkomandi gongur inn fyri blákrosshugsjónini, sum bygd er á kristið grundstøði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi sum skjótast, ella í seinasta lagi 1. juni 2000.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Sólborg Dulavík á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12, Tórshavn

## Hølir til leigu við Stiðjagøtu

Til ymsik endamál, so sum skrivstovu ella goymslu.

Leigumálið er 500 $m^2$ og kann býtast sundur í 3 partar. Ikki er neyðugt at leigumálið er í einum.

Leigumálið kann yvirtakast um ársskiftið 2001.

Møguleiki er fyri at innrætta sjálvi.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovuna hjá P/F Jógvan Weihe á tlf. 31 38 97.

P/f Jógvan Weihe
HEILSØLA

## BILSMIÐJULÆRLINGUR SØKIST

Søkt verður eftir lærlingi til mekaniska verkstað okkara.

Ert tú ágrýtin við áræði og hug til útbúgving innan bilhandverki, so ert tú møguliga tann vit leita eftir.

Vit bjóða tær lærutíð á sera framkomnum verkstaði við øllum nútíðmans hentleikum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú 10. floksprógv folkaskúlans og/ella SIT prógv og helst koyrikort - so send okkum skrivliga umsókn sum skjótast.

P/F Wenzel – Ford í Føroyum
Att.: Anthonius Dalsgaard, verkførari
Akranesgøta 5
100 Tórshavn

Sosialurin - 311820

Ford **P/f Wenzel** Ford
Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tel. 313873
Fax 311173 - Heimasíða: www.wenzel.fo

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 4-H-Sedan

**Árg.:** 1995

**KM:** 83.083

**Eyka útstýr:** El-rútar, sentrallás, 5 gear, ABS

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú til hægstbjóðandi. Bilurin stendur hjá Reyni Service.

Boð skulu latast inn til sýnsmann.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Magna Petersen
tlf. 34 57 28 - 21 57 28
fax nr. 34 56 07
at hitta millum kl. 14.30–16.00.

## PLAST VINDEYGU og- HURÐAR á GOYMSLU




team 85 • 31 65 11

ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F
www.plastverki.fo

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta

## Frítíðaravloysari

søkist beinanvegin til Safari Transport.
Møguleiki er fyri føstum starvi.
Ring og hoyr meira.

SAFARI TRANSPORT tel. 322222 www.safari.fo

Sosialurin - 311820

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

## Suðuroyingar!

Alt VVS-arbeiði verður gjørt skjótt og fyri rímuligan prís.

Orkusparandi Thermomatic oljufýr fáast nú fyri einans kr. 3.200.

**Sp/f Poul Hammer**
**Tlf. 372003 / 282941**

## Maskinførari

Søkt verður eftir maskinførara til støðugt arbeið at byrja beinanvegin.

**P/f Guttesen og Staksberg**
**Tlf. 313495**